# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ynskja politikarar við visjónum

Tað tykist ikki sørt ørmymlandi við øllum teimum útmeldingum, sum samgongutingmenn kropp og kroppi koma við, nú vakstrarpakkin – ella sum hann nú eitur, »ólavsøkupakkin« – er til viðgerðar á tingi.

Sum eygleiðarar undrast vit eisini á, at ein politiskur meirluti fyrst kemur út við boðskapinum um eina politiska semju, sum allir flokkar og øll tingfólk standa saman um. So bíða vit eftir teimum tingfólkunum, sum vanliga ikki finna seg í, at tey sum eru vald at stýra í flokkunum, skulu siga, hvat hesi skulu meina: Hvat man Magni Laksáfoss siga? Hvat sigur Edmund Joensen ella hvat sigur Gerhard Lognberg, bara fyri at nevna tríggjar tingmenn, sum vanliga ikki fylgja floksdisiplinini.

So síggja vit ein smílandi løgmann trína fram á skíggjan í Degi og Viku og siga, at hann hevði verið bangin, um floksfelagarnir ikki tordu at siga sína hugsa...

Tað var annars við stórum spenningi, at vit bíðaðu eftir vakstrarpakkanum. Tí tað er spennandi at fætta, hvørja semju til dømis Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin kunnu koma til. Ein arbeiðaraflokkur og ein arbeiðsgevaraflokkur. Meðan annar vil, at vinnulívið og tey ríku skulu gjalda meira, vil hin, at palliba og tey alment løntu skulu knokkroytast.

Hvørji eru so politisku ráðini til tess at skera í gjøgnum? Jú, vit gera bæði.

Vit leggja hægri gjøld á vinnulívið, lata bankar og tryggingarfelag rinda meira – og eykaskatt á tey ríku. Onkur hevur nevnt hetta »øvundsjúkuskatt«. Á hinum borðinum, so knokkroyta vit eisini frammanundan eyðmýktar pensjónistar og hótta grundarlagið undir fleiri almennum arbeiðsplássum við ógvusligum sparingum – men sleppa kravinum um lønarlækking, tað verður tikið innaftur við almennum uppsøgnum.

Nýhugsan er ikki tað fyrsta, ið okkum rennur í huga. At leggja eyka gjøld á vinnulívið er ikki gott, tað er eyðsæð. Í hesum døgum, tá fleiri sterkar føroyskar vinnufyritøkur eru skrásettar í gjaldskálum uttanlands, so er tað ikki eitt gott tekin frá landsins leiðslu, at inntøkugrundarlagið verður hótt – ikki av fíggjarkreppu, men av almennu Føroyum. At skerja almenn arbeiðspláss, pensjónir og í heila tikið at gera umstøðurnar hjá verkafólki og barnafamiljum verri, tryggjar ikki lívsgrundarlagið í Føroyum.

Vit vildu ynskt okkum politikarar við visjónum – framtíðarætlanum, ið elvdu til nýhugsan og framburð. Politikarar, sum fingu fólkið við sær í framtíðarpolitikkinum.

**Sosialurin**

## ABC vil alt – og onki



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

**ABC-samgongan manglar at levera vøruna á teimum stóru og týðandi politikkøkjunum. Týðandi avgerðir, ið kunnu skapa samanhang, eru ikki tiknar enn, og tí er politiska kósin hjá hesi samgonguni ógreið**

Nú nýggj tingseta er byrjað, kann status gerast yvir politikk og úrslit hjá ABC-samgonguni. Niðurstøðan hjá undirritaða er, at ABC átti at havt rokkið fleiri málum enn teimum, ið rokkin eru.

Europapolitiskt, búskaparliga, fiskivinnupolitiskt, kommunalt, skúlapolitiskt – á teimum stóru politikk-økjunum – manglar ABC at levera vøruna! Hetta er stórt spell, tí í fleiri førum liggja loysnirnar beint fyri. Trupulleikin tykist vera, at týðandi avgerðir, sum skapa samanhang, eru ikki tiknar.

### ABC manglar týðandi avgerðir

Røðan hjá Løgmanni ólavsøkudag málar tíverri eina ov bjarta mynd av samfelagnum, og politiska kósin í røðuni kundi tí verið sett øðrvísi.

Í stuttum ber løgmansrøðan í ár tekin um, at samgongan vil alt – men kortini vil hon onki. Hetta er ein grundleggjandi trupulleiki: Vit vilja alt, og vit vilja onki. Tí kemur heldur onki stórvegis úrslit.

**Niðanfyri eru nøkur dømi:**

- Europapolitiskt vilja vit sleppa uppí hjá ES – og hjá EFTA!
- Búskaparliga vilja vit bæði trýsta á speedaran – og á bremsuna!
- Fiskivinnupolitiskt vilja vit hava UG fyri burðardygga veiðu – men vit halda fram við ovurveiðuni!
- Kommunalpolitiskt vilja vit hava færri og sterkari kommunur – men vit tora ikki at leggja tær saman við lóg!
- Skúlapolitiskt tosa vit um eitt vitanarsamfelag – men vit halda fram at senda ung fólk av landinum at lesa og læra alla aðrastaðni enn í Føroyum.

Røðin av mótstríðandi ætlanum og gerðum er long, og tað kann ikki halda fram.

### Ófokuseraður búskaparpakki

Hitt sonevnda Ólavsøkuuppskotið, sum í hesum døgum er til viðgerðar í Tinginum, er – við orðunum hjá Magna Laksáfoss, tingmanni og búskaparfrøðingi – uttan fokus. Uppskotið er óruddiligt og ymsu komponentarnir stríða ímóti hvørjum øðrum.

Fokussið í búskaparpakkanum átti helst at liggja á at fáa hjólini at mala. Hetta sama berjast aðrar av heimsins stjórnum fyri, og mær tykir, at hetta er eisini týðandi hjá okkum, nú arbeiðsloysið er farið at vaksa, og búskaparligu tølini vísa negativa gongd.

Tað er rættiliga øvugt, at vit í Føroyum – fyri uttan at knokkroyta pensjónistar – leggja eyka skattir á fólk.

Og, sum um hetta ikki er nóg mikið, verður ein nýggj pensjónsskipan sjósett í ringastu kreppu síðani Wall Street á sinni. Hon eigur sjálvsagt at bíða, til búskaparligu tilstandirnir aftur kunnu sigast at vera normalir..

### Vandamesta yvirtøka í Føroya søgu

Nú, vit nema við búskaparpolitikkin, er rætt, at vit í Føroyum minna hvønn annan á tað, sum ráðandi føroyskir politikarar høvdu í kvittanum fyri umleið einum ári síðani.

CHE-landsstýrið sat við valdinum eitt skifti í fjør og ætlaði í ramasta álvara at yvirtaka Fíggjareftirlitið, innskjáðtaratrygdina og alt fíggjarøkið, sum tað er.

Hugsa tær! Hvussu hevði skilið verið í Føroyum í dag, um Høgni Hoydal, Jóannes Eidesgaard og Karsten Hansen fingu sín vilja? Hvat hevði ein løgmaður skula fortalt í røðuni ólavsøkudag um standin í landinum?

Vi vissu kann sigast, at løgmansrøðan hevði havt sum yvirskrift, at føroysku bankarnir eru farnir av knóranum, og at føroyingar hava mist stóran part av uppsparingini.

Um CHE hevði yvirtikið fíggjarøkið, høvdu okkara bankar ikki verið við í bankapakkunum hjá donsku stjórnini, ið m.a. tryggja alt innistandandi hjá føroyingum.

Vit høvdu havt íslendskar tilstandir.

### Ein ør ætlan

Við teirri vitan, vit í dag hava um fíggjarkreppuna og avleiðingarnar av henni, síggja vit nú veruliga, hvussu himmalrópandi ør ætlaða yvirtøkan var.

Hetta skulu vit minnast til, nú vit skifta orð um at fremja búskaparlig tiltøk. Stabilitetur hevur alt at siga, og fíggjarkreppan vísir okkum meira enn nakað annað, at Ríkisfelagsskapurin ER garantur fyri búskaparligum stabiliteti í Føroyum.

Tað ljóðar ófatiligt, men tað eru altso bert fáir mánaðir síðani, at føroyskir politikarar vóru klárir at offra búskaparliga stabilitetin í landinum. Tað má ikki sleppa at henda aftur!

### Uttanlandspolitikkur í stríð við samgonguskjalið

Er búskaparpolitikkurin óruddiligur, so er uttanlandspolitikkurin ein fløkja.

Dulsmál er tað ikki, at landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum og embætisfólk hansara arbeiða beint ímóti tí, sum stendur í samgonguskjalinum um føroyskan Europapolitikk.

Skjalið leggur upp til, at samgongan fyrst skal meta um og finna skilabesta Europaleistin. Síðani skulu samráðingar verða..

Landsstýrismaðurin ger tó nakað heilt annað!

Áðrenn skilabesti leisturin er funnin, hevur landsstýrismaðurin tikið avgerð um, at Føroyar skulu upp í tann doyggjandi felagsskapin EFTA. Aftur og aftur trúttar hann, at "tað er EFTA-limaskap, vit fara eftir".

Hetta er beinleiðis at undirgrava samgonguskjalið.

### Stagneraður Europapolitikkur

Nú skuldi man hildið, at støðan í Europapolitikkinum illa fær verið verri, men tað er hon kortini!

Tí eftir at Ísland hevur søkt Europasamveldið um limaskap, hevur landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum verið úti og sagt, at íslendska umsóknin skal ikki broyta nakað sum helst hjá okkum. Vit skulu látast sum onki!

Skil galskapin rætt: Meðan okkara størsti kappingarneyti fær fría atgongd til okkara høvuðsmarknað, og meðan okkara høvuðsvinna bløðir kappingarførið burtur, skulu vit bara standa og banka uppá hjá tí doyggjandi felagsskapinum.

Hetta er púra burturvið!

Ongantíð hevur tað verið so krystal-klárt sum nú, at Føroyar mugu satsa uppá at koma sær inn um ES-garðin. Okkum nýtist ikki at gera ES-spurningin so fløktan. Í góðum samstarvi í Ríkisfelagsskapinum, og uttan at skala føroyskan sjálvsavgerðarrætt, ið fleiri eru so eym um, ber væl til hjá Føroyum at taka seg inn í Europasamveldið.

Tað snýr seg um at hava politiskan vilja, hegni og hugflog at finna ta góðu loysnina.

### Sunnur sjálvkritikkur

Ongin veit betur enn eg sjálvur, at hesin boðskapurin er ópopulerur at koma við.

Áðrenn grátikonurnar koma við sínum skuldsetingum um illoyalitet og svik, vil eg tó minna á, at vit skylda okkum veljarum at vera sjálvkritisk og erlig um okkara egna politikk.

Bert á tann hátt hava vit álit í fólkinum og trúvirði millum manna.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.